# Hvør sín heimur, ella hvussu?

Var› hesin spurningur settur fyri nøkrum árum sí›ani, høvdu tey flestu veri› á einum máli um, at mannfólk og konufólk hava fullkomuliga hvør sínar uppgávur í gerandisdegi okkara.

Tá var ta› jú solei›is, at hús, heim, uppaling av børnum og anna› var konufólkaarbei›i, me›an ta› var ma›urin í húsinum, sum so syrgdi fyri restini.

Alt hetta er sjálvandi nógv broytt, sí›ani konufólkini eisini komu út á arbei›smarkna›in, og í dag eru nógvir múrar koppa›ir, tá tosa› ver›ur um kynsleiklutir, ella rollufordeiling, sum onkur kanska vildi kalla› ta›.

Í dag ver›ur hesin spurningur umrøddur, tí Terji hevur veri› í sambandi vi› ein ungan klaksvíking, sum er farin læru innan hárfrí›kunaryrki.

Ta› stuttliga í hesum er eisini, at hárfrí›kunaryrki er eitt av teimum, sum í dag ver›ur mett sum eitt typiskt konufólkaarbei›i, tí venda vit aftur til tí›ana, sum sipa› ver›ur til omanfyri, so var ta› avgjørt eitt mannfólkastarv at vera hárskeri ella rakari.

Í dag er hetta so vi›vent, og spurningurin á mi›sí›unum er tí, hvussu ta› er at vera einsamallur hani í høsnagar›inum.

Langt um leingi hava vit eisini fingi› nóg miki› av tilfari til at seta eld í fjúsi› á brøvbumbuni aftur.

Yrkingar og okkurt hjartasuff eru á skránni hesu fer›, og okkurt er longu komi› inn afturat, so hvør veit, um ikki brævbumban ver›ur at síggja aftur í komandi viku.

Hetta fáa vit ikki gjørt so øgiliga nógv vi› her á bla›num, men eru ta› ísta›in tit, sum lesa Yngd, sum gera av, hvørt brævbumbuni ver›ur lív laga› ella ikki.

3-arin er framvegis fúsur at lata fløgur afturfyri innkomi› tilfar til brævbumbuna, so hví ikki n‡ta henda møguleikan fyri at fáa hendur á einum gó›um gávukorti›.

Hvørja fløgu tit skulu keypa fyri eitt møguligt gávukort, kunnu tit meta um vi› at lesa ummælini og/ella tónleikatindarnar, sum eisini eru at finna í bla›num

Gó›an mikudag

# Send inn og vinn

3arin

letur eina fløgu um vikuna til teg, sum hevur besta innslagi› í Yngd.




## Vinn eina fløgu

Nú gevur Yngd tær eisini møguleikan at vinna onkra av nýggjastu fløgunum, sum eru á marknaðinum. Fyri at lesararnir eisini skulu hava høvi at koma fram at, hava vit sjálvsagt rúm fyri einum brævkassa, har lesararnir fáa høvi til at siga sína hugsan um líkt og ólíkt.

Hevur tú eina yrking, eitt hjartasuff um okkurt, ella ein spurning til Yngd ella okkurt heilt annað, so er bara at finna pennin ella telduna fram, og skriva til okkum. Antin til Sosialurin postboks 76, 110 Tórshavn, merk brævbjálvan „Yngd". Ella send okkum teldupost á yngd@sosialurin.fo

Hvørja viku verður so drigið lut ímillum innkomnu brøvini, og vinnarin fær eina spildurnýggja fløgu sendandi frá 3'aranum í SMS. Fyri at eingin skal smæðast burtur, seta vit onga treyt um at innkomið tilfar verður undirskrivað við fullum navni. Navn og bústaður eiga tó verða upplýst til Yngd, soleiðis at vit vita, hvar ein møgulig fløga skal sendast.

**Tí›indabla›i› Sosialurin**
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Tlf: 311820
Fax: 314720
Teldupostur:
yngd@sosialurin.fo

*Ábyrgdarbla›stjóri:*
Jan Müller

*Bla›stjórn:*
..

*Uppseting:*
Karis Olsen

Yngd er ein partur av Sosialinum mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

Les Yngd
í Sosialinum
hvønn mikudag



# Vísdómsor›





## BRÆVBUMBAN

Halló Yngd!!!!!!!!!!

Fyrst vil eg siga, at eg haldi Yngd vera ordiliga well... og her er so mítt hjartasuff:

Eg haldi ta› vera ov vánaligt at vit ungu undir 18 næstan ongasta›ni hava at fara fríggja- og leygarkvøld, og ofta endar ta› vi›, at vit bara ganga og mala ni›ri í b num alla náttina!

Vit áttu at havt eitt sta›, sum var opi› í vikuskiftunum, har møguleiki var fyri at dansa, møta ø›rum ungum o.s.fr. Í løtuni bí›a tey flestu bert eftir at blíva átjan, so tey kunnu sleppa inn á ymsu stø›ini. Hví skal ta› vera ney›ugt at bí›a fleiri ár fyri at fáa tann møguleikan? Og tá vit so endiliga ver›a nóg gomul, eru vit eisini noydd at hugsa um útbúgving, økonomi...

Hev›i ta› ikki veri› møguligt at vildi »make business« upp á eitt »Club 14« (ikki 20)?

Hetta var so alt fyri hesu fer›.

Cassiopaja

Svar:
Ja, hatta er so hin ævigi trupulleikin, sum vónandi ikki er so ævigur kortini. Tú ert ikki tann einasti/einasta sum gremur seg um hetta, og eisini her á Yngd hava vit umrøtt trupulleikan.

Lat okkum vóna, at onkur skjótt tekur seg saman, solei›is at vit øll fáa sama møguleika, tá fari› ver›ur í b in.

Yngd

## Søgan um eitt sandkorn

*Eg eri bara eitt av teimum sandkornum*
*tú tra›kar á ein summardag*
*Bert eitt av sandkornunum, tú letur gli›a*
*millum fingrar tínar,*
*Eg eri sandkorni›, i› situr eftir*
*millum neglir tínar,*
*Sandkorni›, i› festur sær spor í hennara høvdi›,*
*tá tú so eymliga kínur henni um hári›.*
*Eg eri sandkorni›, hon vaskar vekk aftur*
*aftaná hon kemur heim.*
*Ta› sandkorn, i› saman vi› ilmandi skúmi,*
*skolast vekk, fellur á strandarbotn, og*
*rekur inn á strondina, í vón at finna lívi› aftur*
*ella bert ver›a jør›in tú tra›kar á .*

*J.S*

## Kavaveður

Tað er so stuttligt
at ganga
á gøtunum
tá ið kavi er

Eg tekni
við stavi mínum
eina svarta striku
í hvíta kavanum

so kunnu fólk tá síggja
her hevur ein gingið
og droymt.....

Men kavin
hann smeltar jú
skjótt.....